# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


## Oyggjablaðið kemur út aftur mikudagin 4. mai

## Hesaferð: Fiskivinna

**Hetta Oyggjablaðið tekur upp nakrar tættir í høvuðsvinnu okkara. Í hesum blaðnum:**


**Síða 16:** Fiskivinnuskúlin í fokus

**Síða 17:** Vanta navigatørar í Noregi

**Síða 18:** Kollfirðingar við serstakari uppfinning

**Síða 19:** Sensorur kring allan heimin

**Síða 20-22:** 10 ár við grønlendskum trolara

**Síða 23:** Báturin helti 41 stig

**Síða 24-25:** Jan og trukkurin eru eitt

**Síða 26:** Baader heldur og heldur





*Á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna hendir mangt og hvat í hesum døgum*

# Skeið í innaneftirliti og matvørutrygd

**Vestmanna:** Í dag og í morgin verður eitt skeið í innaneftirliti og matvørutrygd hildið á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

Skeiðið vendir sær til stjórar, góðskuleiðarar, formenn og onnur starvsfólk, ið hava ein virknan leiklut í arbeiðinum við innaneftirliti og framleiðslu á fiskavirkjum á sjógvi og landi, og í aðrari matvøruframleiðr úrslu.

Á skeiðnum fara Jákup Mørkøre, Drós í Ólavsstovu og onnur at undirvísa.

Evnini verða heilsufrøðilig viðurskifti, innaneftirlit í praksis, matvørutrygd, smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvi, reingerð, sjálvsrøkt, vandamálsgreining, skoðan, skjalastýring, uppbygging og viðlíkahald av innaneftirliti.

Skeiðið byrjar báðar dagarnar klokkan 9 og endar klokkan 16.

*snorri@sosialurin.fo*

# Fyrireika tilfeingisbreyt komandi ár

**Vestmanna:** Arbeitt verður í løtuni við at fyrireika og gera uppskot til eina námsætlan í tilfeingi og tilfeingisfrøði, sum verða nýggjar profillærugreinir í gymnasialu breytini á Fiskivinnuskúlanum.

Í farna mánaði vitjaði danski fakkonsulenturin Peter Nørgaard á skúlanum, saman við Niclasi Hovgaard og Claus Reistrup úr Mentamálaráðnum.

Danski fakkonsulenturin kunnaði m.a. um líknandi námsætlanir í donsku HTx-útbúgvingini, og um hvussu slíkar lærugreinir eru skipaðar í donsku útbúgvingini.

Fyri Fiskivinnuskúlan luttóku Jákup Andreasen, skúlastjóri, Eyðun Leo, umsitingarleiðari, og Gunvør Hoydal, faklærari.

Nýggja skipanin verður eftir ætlan sett í gildi í sumri 2012.

*snorri@sosialurin.fo*